

Fleiri skip fara undir norskt flagg 1. januar, aftaná broyting í norsku altjóða skipaskrásetingini. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Fyrireika seg til at flagga heim norsk skip

**Jógvan Hugo Gardar**

12.12.2015 - 12:31

Oljan.fo

1. januar verður NIS, altjóða norska skipaskrásetingin, broytt, so til ber hjá NIS-skipum at sigla millum norskar havnir. Higartil hava NIS-skip til dømis ikki kunna silgt við farmi millum tvær norskar havnir, og tað hevur til dømis givið skipum sum eru skrásett undir altjóða skipaskrásetingunum hjá Føroyum, Bahamas og Malta møguleika at arbeiða í norskum sjógvi.

Frá 1. januar kemur broyting í, so NIS-skip, sum partur av evropiskum rutum kunnu sigla millum norskar havnir.

Knud Wendelboe Aanensen, stjóri hjá Hagland Shipping í Haugesun sigur í samrøðu við NRK, at hetta er ein dagur tey gleða seg til.

- Vit hava sagt at vit skulu vera fyrst til at skráseta skip undir NIS tann 1. januar 2016. Vit fara at flagga heim fimm av okkara skipum, skip sum í dag eru undir fløggunum hjá Malta og Bahamas.

E24 veit at siga at Arriva Shipping skal flagga heim seks skip, meðan Dagens Næringsliv skrivar at Misje Rederi og Kristian Gerhard Jebsen Rederi, bæði í Bergen, hava ætlanir um at flagga heim skip.

Hvørjar avleiðingar norska broytingin kemur at hava fyri FAS-skip sum arbeiða í norskum sjógvi í dag er ikki greitt. Tað sum Sverre Meling, leiðari fyri Maritimt Forum metir, sambært E24, er at broytingin kemur at merkja at fleiri arbeiðspláss koma hjá norskum sómonnum, samstundis sum møguligt verður at bjóða ungdómum lærupláss á sjónum.